**Ár 2018, hin 23. mai. kl. 14:30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Beinta Klakstein, Herfrí J. Sørensen (Gunvá við Keldu), Andras Róin, og Marjun W. Thomassen.
**Onnur:** John Færø, trivnaðarstjóri, Marta Nielsen, skrivari og Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Óla Jákup Bech, tekniskur stjóri
**Ikki møtt:** Sigmar Jacobsen

**23.**
**Viðgerð og møgulig áseting av leiguprísum, Biskupstorg**
Bústaðir upplýsir, at tey hava gjørt ávegis uppskot til leiguprísir, men á komandi nevndarfundi er tørvur á nærri áseting av fortreytum, so sum stødd av stovnsfæ v.m.

*KráarN 21-02-2018:*
*Málið útsett til næsta fund.*

KráarN 23-05-2018:
Verður viðgjørt undir øðrum punkti.

**24.**
**Status í byggiarbeiðnum – kunning og umrøða**
a) Biskupstorg v.m.
Andras Róin, stjóri, og Jógvan Skorheim, nevndarformaður, greiða frá

KráarN 23-05-2018:
Málið verið til kunning. Samtykt varð at senda felags tíðindaskriv út 15. juni 2018.

b) Arbeiðini kring Biskupstorg
Óla Jákup Bech, tekniskur stjóri, greiðir frá

KráarN 23-05-2018:
Málið verið til kunning.

**25.**
**Vegahæddin v.m. í Biskupstorgi**
a) MVG-spurningurin
Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, greiðir frá

**Frágreiðing um málið:**
Umsitingin hevur samskift við grannskoðaran og TAKS um spurningin, og er niðurstøðan, at Kráarbrekka fær rætt til at fáa mvg endurgoldið, við at leigumálið verður mvg-skrásett, tvs. at mvg verður lagt oman á leiguna.

Við støði í hesum verður soljóðandi umsókn/fyrispurningur at senda til TAKS viðvíkjandi MVG.

*TAKS*
*Skálatrøð 20*
*110 Tórshavn*

*Klaksvík, 6. mars 2018*

Hesin parturin av málinum er undir avgreiðslu. Í løtuni bíðar Umhvørvisstovan, sum avgreiðir frámatrikuleringina, eftir brunagóðkenningini. Henda partin umsitur Sverri Michalsen, byggifulltrúi, og hevur hann samskift við US um hetta.

Sverri upplýsir, at hann fer at geva Umhvørvisstovuni eina brunagóðkenning av bygginginí Biskupstorg, tá ið KANJON hevur váttað fyri sær, at teir hava bygt Biskupstorg eftir byggiloyvinum, at hurðarnar í niðastu hædd eru ísettar o.s.fr., at øll bjargingarop (takvindeygu) eru í lagið á ovastu hædd, har kømur eru.

Eskild Norðbúð, arbeiðsformaður hjá KANJON, hevur upplýst fyri Sverra, at hurðar og aðrar tettingar, sum sikra brunaskiljingina, ikki eru ordiliga lidnar, og heldur ikki bjargingarop í tekju, men hann váttar, at hetta verður gjørt, áðrenn bygningurin verður handaður.

Somuleiðis váttar Eskild, at KANJON hevur fylgt ásetingunum í prosjektinum.

Við støði í hesum váttar Sverri Michalsen, byggifulltrúi, fyri umsitingini, at Biskupstorg verður brunagóðkent, tá ið nevndu viðurskifti eru avgreidd.

Sostatt eru allar fortreytir til staðar fyri, at málið kann verða avgreitt, tá ið nevndu viðurskifti eru framd av KANJON.

Tó kann frámatrikuleringin ikki avgreiðast, fyrr enn hetta er avgreitt, og harvið kann leigusáttmálin heldur ikki undirskrivast fyrr enn tá.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður nevndin við hesum kunnað um, at KANJON og byggifulltrúin vátta, at bygt verður samsvarandi ásetingunum í byggiloyvi og projekti, og at allar fortreytir fyri ætlaðu frámatrikuleringini harvið eru ávegis at verða loknar, tá ið arbeiðið er liðugt avgreitt.

KráarN 23-05-2018:
Málið verið til kunning.

c) Leigusáttmálin millum Kráarbrekku og KK
Jógvan Skorheim, nevndarformaður, greiðir frá

Umsitingin hevur – saman við Jógvani Páll Lassen, advokati, gjørt viðlagda uppskot til leigusáttmála millum Kráarbrekku og KK, sum vi hesum verður lagdur fyri nevndina til viðgerðar við tilmæli um samtykt.

**Tilmæli:**

Vísandi til:

- at allar fortreytir fyri ætlaðu frámatrikuleringini í sambandi við leigusáttmálan millum Kráarbrekku og KK um veghæddina í Biskupstorg eru ávegis at verða loknar, tá ið viðkomandi arbeiði er liðugt avgreidd, og

- at fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála sostatt kann verða undirskrivað tá,

verður mælt nevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála við gildi frá tí degi, at frámatrikuleringin er avgreidd frá Umhvørvisstovuni.

**b.**
**Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi**
Roknskapurin varð gjøgnumgingin saman við grannskoðanarprotokollini og varð einmælt góðkendur.

**c.**
**Framløga av rakstrarætlan**
Samtykt at leggja rakstrar-/fíggjarætlan fyri komandi ár fram á seinni fundi.

**d.**
**Val av granskoðara**
Aðalfundurin samtykti at velja Spekt at halda fram sum grannskoðari.

**e.**
**Áseting av møguligari nevndarsamsýning**
Aðalfundurin samtykti at útseta støðutakan til hetta mál til ein seinni fund.

**f.**
**Ymiskt**

**Fundurin lokin kl. 16:05**

____________
(undirskrift nevndarskrivarans)

____________ ____________

____________ ____________

____________ ____________

**Ár 2017, hin 21. feb. kl. 14:30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Beinta Klakstein, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Sigmar Jacobsen og Marjun W. Thomassen.
**Onnur:** John Færø, skrivari og Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Òla Jákup Bech, tekniskur stjóri og Maria Thorsteinsson, journalleiðari

**19.**
**13/00701 Kráarbrekka, bústaðabygging í miðbýnum – leigusáttmálar**
Tummas T. Eliasen, kommunustjori, hevur – í samráð við m.o. Óla Jákup, Gunnleyg, undirritaða og Jógvan Páll Lassen, adv. – arbeitt við niðanfyri nevndu uppskotum til leigusáttmálar, sum eru viðlagdir, og sum við hesum verða lagdir fyri stýrið til góðkenningar, áðren teir kunnu verða undirskrivaðir.

**13/00701-56 Leigusáttmáli millum KK og Kráarbrekku fyri grundøkið, Biskupstorg**
Sum tað framgongur av sáttmálanum, er leigan fyri íbúðapartin ásett at verða kr. 16,20 pr. $m^2$, meðan leigan fyri vinnuliga partin (veghæddina) er ásett at verða kr. 38,80 pr. $m^2$.

Á fundinum verður nærri greitt frá leigusáttmálanum, sum mælt verður stýrinum til at góðkenna og skriva undir.

**13/00701-53 Leigusáttmáli millum Kráarbrekku og KK fyri veghæddina, Biskupstorg**
Arbeitt hevur verið við matrikuleringini, sum í skrivandi løgu eru um at verða upp á pláss, soleiðis at leigusáttmálin kann fáa gildi.

Á fundinum verður nærri greitt frá leigusáttmálanum, sum mælt verður stýrinum til at góðkenna og skriva undir.

**KráarN 21-02-2018:**

Viðv. leigusáttmáli millum Kráarbrekku og KK fyri veghæddina, Biskupstorg
Tummas T. Eliasen, kommunustjóri kunnaði um rentuna vísandi til uppskot til sáttmálan.
Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku tekur lán, meðan Klaksvíkar kommuna rindar leigu svarandi til lánsgjaldið.
Eftir umrøðu av málinum samtykti nevndin at taka málið uppaftur á næsta fundi.

Viðv. leigusáttmáli millum KK og Kráarbrekku fyri grundøkið, Biskupstorg
Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**20.**
**Kunning um byggiarbeiðið, Biskupstorg**
Andras Róin o.o. greiða frá.

KráarN 21-02-2018:
Andras Róin greiddi frá gongdini í byggingini.

**21.**
**Kunning um lendisarbeiðið kring Biskupstorg**
Óla Jákup Bech greiðir frá.

KráarN 21-02-2018:
Óla Jákup Bech greiddi frá gongdini við lendisarbeiðininum kring Biskupstorg.

**22.**
**Viðgerð og møgulig áseting av leiguprísum, Biskupstorg**
Bústaðir upplýsir, at tey hava gjørt ávegis uppskot til leiguprísir, men á komandi nevndarfundi er tørvur á nærri áseting av fortreytum, so sum stødd av stovnsfæ v.m.

KráarN 21-02-2018:
Málið útsett til næsta fund.

**Fundurin lokin kl. 16:00**

(undirskrift nevndarskrivarans)

**Ár 2017, hin 9. nov. kl. 14:30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, nevndarformaður, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Sigmar Jacobsen og Marjun W. Thomassen.
Beinta Klakstein hevur givið avboð til fundin.
**Onnur:** John Færø, skrivari og Tummas T. Eliasen, kommunustjóri

**8.**
**Lendið undir Biskupstorg**
Leiguavtala skal gerast millum Klaksvíkar kommunu og Kráarbrekku
*Status: Tekniska Umsiting (Gunnleyg K. Dánjalsson) er í ferð við'at gera eitt uppskot til leigusáttmála, sum verður lagt fyri komandi fund*

KráarN 09-11-2017:
Nevndin tekur undir við uppskotinum um leigusáttmála millum Klaksvíkar kommunu og Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku, og vil hava greiðu á, hvussu leigukostnaðurin verður lutaður millum íbúðapartin og vinnuliga virksemið (veghæddina).

**9.**
**Veghæddin í Biskupstorg**
Frámatrikulering av veghæddini frá restini av bygginini
*Status: Heitt er á Teknisku Umsiting (Gunnleyg) um at avgreiða hesa frámatrikulering.*

KráarN 09-11-2017:
Nevndin er kunnað um, at bíðað verður eftir svarið frá Umhvørvisstovuni um sundurmatrikulering av veghæddini og íbúðapartinum.

**10.**
**Avtala um gjald (prís) fyri veghæddina**
*Status:Higartil hevur verið tosað um eina upphædd á 25 mió. kr. fyri hæddina. Upphæddin verður tó at áseta endaliga av nevndini.*

KráarN 09-11-2017:
Nevndin tekur undir við ásetta virðinum fyri veghæddina á 25 mió. kr.

**11.**
**Fígging frá NS fyribils fyri veghæddina**
*Status: Tummas T. Eliasen hevur verið í samband við Norðoya Sparikassa (NS), sum er sinnaður at veita hesa fígging.*

KráarN 09-11-2017:
[redacted] eigusáttmáli verður gjørdur við Klaksvíkar kommunu um veghæddina.

**12.**
**Leiguavtala gerast millum Kráarbrekku og KK**

*Status: Uppskot til leigusáttmála verður í løtuni orðað, har KK leigar hølini í veghæddini frá Kráarbrekku.*

KráarN 09-11-2017:
Nevndin tekur undir við, at hølini verða leigað til Klaksvíkar kommunu.

**13.**
**Umrøða av framtíðar skipan fyri veghæddina – kommunan arbeiðir víðari við hesum**
*Status: Við leigusáttmálanum um veghæddina yvirtekur KK nýtsluna av hesum hølum, samstundis sum farið verður undir at arbeiða við framtíðar skipan og nýtslu av veghæddini.*

KráarN 09-11-2017:
Jógvan Skorheim kunnaði nevndina um arbeiðið higartil við framtíðar nýtslu av veghæddini, sum [redacted]

**14.**
**Uttanumøkini og tíðarætlan**
*Status: Heitt er á Teknisku Umsiting (Óla Jákup Bech) um at útgreina eina tíðarætlan fyri liðugtgerð av uttanumøkjunum kring Biskupstorg, sum verður at leggja fyri komandi nevndarfund.*

KráarN 09-11-2017:
Andras Róin kunnaði nevndina um dagførdu arbeiðs- og tíðarætlanina fyri Biskupstorg og uttanumøkið.

**15.**
**Orkuskipan og tíðarætlan**
*Status: Heitt er á Teknisku Umsiting (Óla Jákup Bech) um at útgreina eina tíðarætlan fyri liðugtgerð av orkuskipanini, sum verður at leggja fyri komandi nevndarfund.*

KráarN 09-11-2017:
Jógvan Skorheim kunnaði nevndina um dagførdu arbeiðs- og tíðarætlanina fyri orkuskipanina.

**16.**
**Fígging frá NS til Kráarbrekku fyri part av byggingini og til møguligar aðrar bústaðaverkætlanir**
*Status: Tummas T. Eliasen hevur verið í samband við NS, sum er áhugaður at luttaka í slíkari fígging.*

KráarN 09-11-2017:
Nevndin umrøddi málið. Nevndin tekur undir við, at Bústaðir kannar aðrar møguleikar fyri lánifígging enn frá Bústøðum, sum verður at viðgera nærri seinni.

**17.**
**Lýsing og viðgerð av møguligum leiguprísum fyri ymsu íbúðirnar**
*Status: Bústaðir eru í holtur við at hyggja at kostnaðum og húsaleiguprísum, og býráðsumsitingin og Bústaðir hava avtalað at brúka teir næstu 14 dagarnar til at framleiða eitt upplegg á hesum øki.*

Ein partur liggur her hjá okkum, og tað er, hvussu húsaleigurnar verða undir givnum fortreytum. Hjálagt eitt rokniark sum vísur húsaleigurnar við 4 ymisk scenariir.

Fortreytin er harumframt, at kostnaðurin fyri verkætlanin verður hildin á kr. 97 mió (inkl. Tilkeyp, byggirentu o.a.) og við frádrátt fyri veghædd á kr. 25 mió.
Tað gevur kr 72 mió at forrenta umvegis húsaleigurnar.

Scenarriini eru so:

a. uttan stovnsfæ, t.v.s. uttan grundkapital og soleiðis at alt skal forrentast frá degi 1.
b. 30 %, sum Bústaðir vanliga brúkar (kann verða ynskiligt at seta alt líka)
c. 24 mió kr stovnsfæ sum er tað sum sjálvsognarstovnurin pt eigur at koyra í (svarar her til 33%)
d. 30 mió kr stovnsfæ, sum er tað sum eldri avtalupappírini umrøða. (kann argumenterast fyri hesum, tí byggjaríið er flottari og meira "estetiskt" enn leigarar skulu svara fyri)

Í rokniarkinum sæst so, hvat ið húsaleigurnar verða fyri tær einstøku íbúðirnar, sí fordeiling.

[redacted]

Bústaðir roknar í dag við 2,75% í rentu yvir 30 ár av 70% kapitalíløgu, men ynskiligt frá okkara síðu, at onnur ekstern fígging kemur inn yvir.

KráarN 09-11-2017:
Samtykt at taka undir við, at pkt. b) í upplegginum frá Bústøðum verður nýtt, soleiðis at húsaleigan verður roknað við 30% í stovnsfæi, eins og aðrastaðni hjá Bústøðum.

**18.**
**Roknskapur fyri 2016**
*Status: Viðfestur er grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2016 og tilhoyrandi grannskoðanarprotokollin, sum verður lagt fyri komandi fund til góðkenningar.*

KráarN 09-11-2017:
Samtykt at góðkenna ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina fyri 2016, sum síðani varð undirskrivað á fundinum.

**Fundurin lokin kl. 16:45**

(undirskrift nevndarskrivarans)

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001


**Ár 2017, hin 29. mars kl. 14:30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, nevndarformaður, Beinta Klakstein, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Sigmar Jacobsen, Marjun W. Thomassen.
**Onnur:** John Færø, skrivari, Marta Nielsen, skrivari, og Bogi Jacobsen

**1.**
**Kunning um íbúðarverkætlanir**
**Samtykt á síðsta fundi:** Samtykt at kalla inn aktørarnar, sum í løtuni arbeiða við lestraríbúðaverkætlan og bústaðaverkætlan.

Fritleif Olsen kom á fundin og greiddi frá verkætlan síni, sum er at umbyggja fyrrverandi Taks-bygningin til íbúðir.
Formaðurin viðmælir, at Sjálvsognarstovnurin Kráarbrekka leigar alt undir einum og Bústaðir umsitur tað og leigar út til einstakan. Samtykt, at Fritleiv og Andras tosa víðari um tað projektið.

Gordon Rajani og Palli Skorheim komu inn á fundin at greiða frá verkætlan teirra, sum er at byggja íbúðir/raðhús Millum Hjalla.
*Nevndarformaðurin fór av fundinum og luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.*
Stigtakararnir levera íbúðir við lendi, ið er keypt/leigað frá kommununi. Íbúðirnar eru bingjur, ið kunnu vera ymiskar í stødd, og sum verða framleiddar og innfluttar lyklaklárar. Ein hollendsk/donsk loysn. Víst verður til www.mark.fo. Bjálving innan og uttan. Kommunan leverar lendið, teir levera bústaðirnar, Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku bindur seg at gjalda leiguna, og Bústaðir umsita leigumálini. Tað nýtist ikki at ganga meir enn 4 mánaðir frá byrjan, og til bústaðirnir eru klárir at taka í nýtslu. Leiguprísirnir eru treytaðir av, hvussu nógv lendið kostar. Lítlar íbúðir 15 $m^2$, stórar 30$m^2$. Um tað skal vera líka sum verkætlanin í Tórshavn, so verða tað 38 íbúðir, 6 stórar, 32 lítlar. Tørvur er á einum grundstykki á umleið 1200 $m^2$, parkering er við. Eitt hugskot hevði verið, at við í prísinum var ein bilur, ið eini 5 fólk kundu deilast um.

**2.**
**15/01184: Kunning um bygginginа - Biskupstorg**
Andras kunnaði um gongdina á Biskupstorgi. Tíðar- og kostnaðarætlaninar síggja út til at halda. Tó eru trupulleikar við leveringini av vindeygum. Ein loysn verður funnin á hesum í samráð við veitaran. Nevndin umrøddi eisini sjóhitaskipanina og møguleikarnar fyri at seta í verk eina alternativa hitaskipan, um so er, at sjóhitaskipanin verður seinkað.

**3.**
**13/00701: Uppgerð yvir kostnaðin av veghæddini**
**Samtykt á síðsta fundi:** Nevndin umrøddi málið. Samtykt at arbeiða víðari við, at sjálvsognarstovnurin keypir veghæddina frá Bústaðir, samstundis sum arbeitt verður víðari við, hvussu hæddin verður skipað og disponerað, tá ið byggingin er liðug.

[redacted]

Nevndarformaðurin kunnaði um, at samskift verður í løtuni við Klaksvíkar Handilsfelag um, hvussu veghæddin best møguliga verður gagnnýtt.

**4.**
**13/00701: Leiguprísir hjá Bústaðir. Biskupstorg?**
Málið verður tikið uppáftur á komandi fundi.

**5.**
**Ymiskt**
Nevndin umrøddi ársfundin, og hvussu hesin skjótast kann verða avgreiddur. Avrátt varð at samskifta víðari um, hvussu hetta best verður avgreitt.

Skrivað varð undir byggikreditt frá Bústøðum til Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku, áljóðandi upp til 100 mió. kr.

**Fundurin lokin kl. 17:10**

(undirskrift nevndarskrivarans)

KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001



**Ár 2017, hin 1. februar kl. 14:30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Beinta Klakstein, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Sigmar Jacobsen, Marjun W. Thomsen.
**Onnur:** John Færø, skrivari, og Maria Thorsteinsson, journalleiðari.

**1.**
**Skipan av nevnd og mannagongdum.**

Nevndin samtykti at velja *Jógvan Skorheim* til formann, og *Andras Róin* til næstformann í nevndini. Nevndin samtykti somuleiðis at velja *John Færø* til skrivara hjá nevndini.

**2.**
**15/01184: Kunning um bygginginа - Biskupstorg**
Andras Róin kunnaði um gongdina í byggingini, har tað higartil hevur gingið væl at halda kostnaðarætlanina, meðan illveður hevur ført til frávik frá tíðarætlanini.
Nevndin samskifti um gongdina, har hon eitt nú umrøddi spurningar um leigukostnað, upptøkureglur o.s.fr.

**3.**
**Viðvíkjandi fígging av Biskupstorg**
Andras Róin kunnaði um, at tað dregur út við at avgreiða málið í løgtinginum at útvega Bústaðir heimild til at útvega fígging, og hann mælir tí til, at nevndin kannar aðrar fíggingarmøguleikar. Jógvan Skorheim upplýsti, at Norðoya Sparikassi hevur víst áhuga í at vera við til at fíggja Biskups-torg. Nevndin samtykti at heita á formannin um at taka upp samband við Norðoya Sparikassa og aðrar fíggingarstovnar fyri at kanna møguleikar og treytir fyri fígging á leið 40 mió. kr., og at umboð fyri Bústaðir eisini verða við til hesar fundir.

**Aðrar bústaðaverkætlanir í Klaksvík**
Nevndin umrøddi tvær aðrar bústaðaverkætlanir í Klaksvík – [redacted] og ein á Stongunum – sum arbeitt verður við í løtuni. Samtykt at bjóða stigtakarunum inn at kunna og samskifta við nevndina um verkætlanirnar.

Samtykt, at næsti fundur verður 1. mars 2017, har m.a. kunnað verður um bústaðaverkætlanir í Klaksvík.

**Fundurin lokin kl. 15:45**

____________
(undirskrift nevndarskrivarans)

**Ár 2016, hin 20. apríl kl. 14.30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Marjun Weihe Thomassen og Sigmar Jacobsen.
Onnur: John Færø, skrivari, Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Maria Thorsteinsson, skrivari, Kristian Rasmussen, ráðgevi og Jógvan Páll Lassen, adv.

**50.**
**Broyting av viðtøkunum**
Jógvan Páll Lassen adv. legði fram og mælti til, at nevndin samtykkir broytingarnar í viðtøkunum.

**Samtykt:** Nevndin tekur undir við broytingunum í viðtøkunum, dagfestar 20. apríl 2016, og mælir ársfundinum til at samtykkja viðtøkurnar.

**51.**
**Kunning um Biskupstorg**
Andras Róin, stjóri fyri Bústaðir, legði fram.

**Samtykt:** Málið verið til kunning.

**52.**
**Bústaðir – verkætlanir: Hvalvík, HF-bygningurin, Bygn. hjá Anthonius Olsen (fyrrv. Rúsan)**
Jógvan Skorheim, nevndarformaðurin greiddi frá gongdini.

**Samtykt:** Málið verið til kunning.

**53.**
**Ymiskt**

***Ársaðalfundur***

**a.**
**Frásøgn nevndarformansins frá virki Sjálvsognarstovnsins farna ári**
Nevndarformaðurin kunnaði um gongdina og vísti til frágreiðingina í roknskapinum.

**b.**
**Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi**
Roknskapurin varð gjøgnumgingin saman við grannskoðanarprotokollini og varð einmælt góðkendur.

**c.**
**Framløga av rakstrarætlan**
Samtykt at leggja rakstrar-/fíggjarætlan fyri komandi ár fram á seinni fundi.

**d.**
**Val av granskoðara**

Aðalfundurin samtykti at velja Spekt at halda fram sum grannskoðari.

**Ár 2016, hin 16. mars kl. 12.30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Marjun Weihe Thomassen og Sigmar Jacobsen.
Onnur: John Færø, skrivari, Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Maria Thorsteinsson, skrivari, og Kristian Rasmussen, ráðgevi.

**46.**
**15/01184 – Stýrisbólkafundir – bygging í miðbýarøkinum**
**Samtykt:** Biskupstorg – Kristian Rasmussen kunnaði um gongdina. Til komandi fundir fær nevndin rundsýning á byggiplássinum.

**47.**
**16/000224 – Støðutakan til tilboð frá Klaksvíkar Handverkarafelagið – "Hvalvík"**
Víst verður til tilmæli frá umsitingini, dagfest 16. mars 2016, har mælt verður til at ogna sær húsið skjótast gjørligt, og spyrja eina byggifyritøku í Klaksvík um ein kostnað og tekningar fyri heildarumæling av húsinum, har miðað verður ímóti, at fáa 6-8 íbúðir. Tá ið tilboð og tekningar eru fingnar til vega, verður málið at leggja fyri aftur.

**Samtykt:** Nevndin er positiv yvir fyri verkætlanini og heitti á formannin um at fáa skitsur og fyribils kostnaðarmeting frá arbeiðstakarum. Málið verður tikið upp til næsta fund.

**48.**
**16/00224 – Kunning um ymiskar bygningar til íbúðarendamál**
Jógvan Skorheim, nevndarformaður kunnaði nevndina um ætlaninar við HF-bygninginum og fyrverandi rúsuna (Anthonius Olsen).

**Samtykt:** Málið verið til kunning. Bústaðir taka upp samráðingar við Mentamálaráðið um yvirtøku av HF-bygninginum.

**49.**
**15/00712 – Viðtøkurnar fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku**
Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, kunnaði um tilgongdina.

**Samtykt:** Nevndin varð kunnað og umrøddi málið, sum semja er um at avgreiða, soleiðis at nevndin á komandi fundi kann undirskriva dagførdu viðtøkurnar og allar neyðugar avtalur millum partarnar, so sum lániskjøl, leiguavtalu, fíggingarleist og loyvi til mvg-afturbering frá kommununi.

**Fundurin lokin kl. 14:30**

____________________
(undirskrift nevndarskrivarans)

____________________ ____________________

____________________ ____________________

____________________ ____________________

**Ár 2016, hin 5. oktober kl. 14.00 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Andras Róin og Sigmar Jacobsen.
Onnur: John Færø, skrivari, Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Maria Thorsteinsson, skrivari.

**54.**
**15/00712 - Kunning um bygginginа - Biskupstorg**
Jógvan Skorheim, formaður kunnaði um gongdina.

**55.**
**13/00701 - Uppgerð yvir kostnaðin av vegahæddini**
Andras Róin, stjóri, og Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, arbeiða víðari við eitt nú niðanfyri nevndu viðurskiftum:

- Kostnaðurin av veghæddini?
- Finna eina dagfesting fyri yvirtøku av veghæddini
- Áseting av húsaleigu – hetta hevur ikki skund, men skilagott er at byrja at arbeiða við hesum í góðari tíð
- Hvør skal eiga/fíggja Biskupstorg? Her møguligir íleggjarar áhugaðir.
- Bústaðir arbeiðir við fremmandari fígging, men bíðar enn eftir heimild frá FMR

**56.**
**13/00701 - Leigusáttmálauppskot**
Uppskot til leigusáttmála millum Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku og Klaksvíkar kommunu varð framlagt á fundinum. Limirnir fáa møguleika at nærlesa uppskotið. § 3 má greinast betur.

**57.**
**16/00224: Áður umrøddar verkætlanir og møguligir nýggir møguleikar**
Stýrið umrøddi møguleikar sum eitt nú Kráarbrekku II, fyrrverandi HF-bygningin, grundlendi Millum Hjalla, sum KK í løtuni hevur bjóðað út til bústaðabygging.

**Fundurin lokin kl. 16.15**

(undirskrift nevndarskrivarans)

**Ár 2016, hin 30. november kl. 14.30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:**
Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Andras Róin og Sigmar Jacobsen.
Møtti ikki: Marjun Weihe Thomassen og Óluva Klettskarð
Onnur: John Færø, skrivari, Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Maria Thorsteinsson, skrivari

**58.**
**<u>15/01184: Kunning um bygginginga - Biskupstorg</u>**
**Andras Róin greiddi frá status við bygginigini, meðan Jógvan Skorheim greiddi frá status við uttanumøkinum, parkeringsviðurskifti v.m.**

**59.**
**<u>13/00701: Uppgerð yvir kostnaðin av veghæddini</u>**
Tummas T. Eliasen, kommunustjóri og Andras Róin, stjóri í Bústaðir hava samskift um tilgongdina í samband við at gera upp, hvat veghæddin skal keypast fyri. Men ein partur av hesari tilgongd er áseting av leigukostnaðinum fyri íbúðapartin.
Kostnaðurin av veghæddini vil vera ein semja partanna millum, hvat virði veghæddin hevur.
Eitt hægri virði vil alt annað líka føra til ein lægri leigukostnað. Tí hevði tað verið ynskiligt, um nevndin fastlegði rætningslinjurnar fyri, hvørjum kostnaðurin av veghæddini skal uppgerast eftir.
**Nevndin umrøddi málið. Samtykt at arbeiða víðari við, at sjálvsognarstovnurin keypir veghæddina frá Bústaðir, samstundis sum arbeitt verður víðari við, hvussu hæddin verður skipað og disponerað, tá ið byggingin er liðug.**

**60.**
**<u>13/00701: Leiguprísir hjá Bústaðir. Biskupstorg?</u>**
Andras Róin, stjóri í Bústaðir, greiddi frá leigukostnaðum fyri tey leigumál, sum Bústaðir hevur, vísandi til eitt yvirlit yvir hesi leigumál, sum varð lagt fram á fundinum. Nevndin umrøddi málið.
**Samtykt at heita á Bústaðir um at koma við einum uppleggi at viðgera saman við býráðsumsitingini, ið verður lagt fyri komandi nevndarfund.**

**61.**
**<u>13/00701: Umrøða møguleikan eigara- ella lutaíbúðir</u>**
Vísandi til fundin, sum var millum Bústaðir og Føroya Landsstýri um bústaðapolitikk sum heild, er frá politiskari síðu eitt ynski um, at bústaðamynstrið verður so fjølbroytt sum gjørligt, og at tað ikki bert eru Bústaðir, sum fremja hesar verkætlanirnar.
Eisini er myndugleikin sinnaður at góðtaka "hybrid-loysnir", tað er at leiga-, luta- og eigaraíbúðir kunna vera partur av somu verkætlan.
Vit mæla til, at nevndin tekur hendan spurningin upp, um ein "hybrid-loysn" kann vera ein møguleiki í samband við Biskupstorg.
**Samtykt at halda fast við leiguíbúðir, men at taka við í víðari viðgerðina, at tað hevði verið ynskiligt, um leigarar fingu møguleika at gjalda eitt hægri innskot (depositum), ið samstundis gav eitt tilsvarandi lægri leigugjald.**

**Ár 2016, hin 20. apríl kl. 14.30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Marjun Weihe Thomassen og Sigmar Jacobsen.
Onnur: John Færø, skrivari, Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Maria Thorsteinsson, skrivari, Kristian Rasmussen, ráðgevi og Jógvan Páll Lassen, adv.

**50.**
**Broyting av viðtøkunum**
Jógvan Páll Lassen adv. legði fram og mælti til, at nevndin samtykkir broytingarnar í viðtøkunum.

**Samtykt:** Nevndin tekur undir við broytingunum í viðtøkunum, dagfestar 20. apríl 2016, og mælir ársfundinum til at samtykkja viðtøkurnar.

**51.**
**Kunning um Biskupstorg**
Andras Róin, stjóri fyri Bústaðir, legði fram.

**Samtykt:** Málið verið til kunning.

**52.**
**Bústaðir – verkætlanir: Hvalvík, HF-bygningurin, Bygn. hjá Anthonius Olsen (fyrrv. Rúsan)**
Jógvan Skorheim, nevndarformaðurin greiddi frá gongdini.

**Samtykt:** Málið verið til kunning.

**53.**
**Ymiskt**

***Ársaðalfundur***

**a.**
**Frásøgn nevndarformansins frá virki Sjálvsognarstovnsins farna ári**
Nevndarformaðurin kunnaði um gongdina og vísti til frágreiðingina í roknskapinum.

**b.**
**Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi**
Roknskapurin varð gjøgnumgingin saman við grannskoðanarprotokollini og varð einmælt góðkendur.

**c.**
**Framløga av rakstraræltan**
Samtykt at leggja rakstrar-/fíggjarætlan fyri komandi ár fram á seinni fundi.

**d.**
**Val av granskoðara**

Aðalfundurin samtykti at velja Spekt at halda fram sum grannskoðari.

**Ár 2016, hin 16. mars kl. 12.30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Marjun Weihe Thomassen og Sigmar Jacobsen.
Onnur: John Færø, skrivari, Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Maria Thorsteinsson, skrivari, og Kristian Rasmussen, ráðgevi.

**46.**
**15/01184 – Stýrisbólkafundir – bygging í miðbýarøkinum**
**Samtykt:** Biskupstorg – Kristian Rasmussen kunnaði um gongdina. Til komandi fundir fær nevndin rundsýning á byggiplássinum.

**47.**
**16/000224 – Støðutakan til tilboð frá Klaksvíkar Handverkarafelagið – "Hvalvík"**
Víst verður til tilmæli frá umsitingini, dagfest 16. mars 2016, har mælt verður til at ogna sær húsið skjótast gjørligt, og spyrja eina byggifyritøku í Klaksvík um ein kostnað og tekningar fyri heildarumæling av húsinum, har miðað verður ímóti, at fáa 6-8 íbúðir. Tá ið tilboð og tekningar eru fingnar til vega, verður málið at leggja fyri aftur.

**Samtykt:** Nevndin er positiv yvir fyri verkætlanini og heitti á formannin um at fáa skitsur og fyribils kostnaðarmeting frá arbeiðstakarum. Málið verður tikið upp til næsta fund.

**48.**
**16/00224 – Kunning um ymiskar bygningar til íbúðarendamál**
Jógvan Skorheim, nevndarformaður kunnaði nevndina um ætlaninar við HF-bygninginum og fyrverandi rúsuna (Anthonius Olsen).

**Samtykt:** Málið verið til kunning. Bústaðir taka upp samráðingar við Mentamálaráðið um yvirtøku av HF-bygninginum.

**49.**
**15/00712 – Viðtøkurnar fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku**
Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, kunnaði um tilgongdina.

**Samtykt:** Nevndin varð kunnað og umrøddi málið, sum semja er um at avgreiða, soleiðis at nevndin á komandi fundi kann undirskriva dagførdu viðtøkurnar og allar neyðugar avtalur millum partarnar, so sum lániskjøl, leiguavtalu, fíggingarleist og loyvi til mvg-afturbering frá kommununi.

**Fundurin lokin kl. 14:30**

____________________
(undirskrift nevndarskrivarans)

____________________ ____________________

____________________ ____________________

____________________ ____________________